# Nýtekning av partapeningi í P/F Atlantic Petroleum

Sambært § 34 stk. 2 í partafelagslógini verður við hesum boðað frá, at nevndin í P/F Atlantic Petroleum á nevndarfundi tann 2. juni 2006 við heimild í § 3 í viðtøkum felagsins hevur avgjørt við nýtekning at hækka partapening felagsins við í minsta lagi nom. DKK 5.455.000 og í mesta lagi nom. DKK 36.998.900. Felagið hevur tryggjað sær, at teknaðar verða í minsta lagi minsta upphæddin nom. DKK 5.455.000 og er eitt og hvørt innkomið tilboð um tekning av partapeningi tí bindandi.

Fyri hesa nýtekning av partapeningi eru galdandi hesar ásetingar:

1. Innbjóðing til at tekna partapening fer fram sum ein áheitan um at koma við tilboði um at vilja tekna partapening í felagnum.
2. Partapeningurin fær somu rættindi í felagnum sum verandi partapeningur;
3. Partabrøvini skulu ljóða uppá navn og eru negotiabul;
4. Partaeigararnir hava onga skyldu at lata partabrøv síni innloysa;

4a. Fyri nýggju partabrøvini er eisini galdandi henda avmarking í ognar- og atkvøðurættinum til partabrøv í felagnum:
Eingin partaeigari kann eiga meiri enn 20 % av partapeninginum í felagnum og eingin kann greiða atkvøðu á aðalfundi í felagnum við meiri enn 20 % av atkvøðunum. Løgfrøðiligir persónar, ið innanhýsis eru so tætt knýttir hvør at øðrum, at annar hevur avgerðandi ávirkan á viðurskiftini hjá hinum, verða at meta sum ein í mun til hesa ognar- og atkvøðuavmarking, soleiðis at hesir løgfrøðiligu persónar tilsamans bert kunnu eiga og greiða atkvøðu fyri í mesta lagi 20 % í partapeningi.

Sum dømi um slíkt tætt tilknýti millum løgfrøðiligar persónar, ið fevnt er av hesi grein, kunnu nevnast:

- innanhýsis viðurskifti millum partafeløg, ið eftir ásetingunum í § 2 í partafelagslógini eru at meta sum koncernbundin;
- innanhýsis viðurskifti millum aðrar løgfrøðiligar persónar og partafeløg, har hesir aðrir løgfrøðiligu persónar eiga meiri enn ella hava rætt til at greiða atkvøðu fyri meiri enn 50 % av partapeninginum í partafelagnum;
- innanhýsis viðurskifti millum almennar stovnar.

5. Verandi partaeigarar, sí punkt 10 síðsta punkt, hava fortekningsrætt til henda nýggja partapening og er hesin roknaður út sum ein rættur til at tekna nom. DKK 100 í nýggjum partapeningi fyri hvørjar nom. DKK 200 viðkomandi partaeigari eigur í partapeningi í felagnum frammanundan. Ongar avmarkingar galda í fortekningsrættinum hjá nýggja partapeninginum við kapitalhækkingum í felagnum í framtíðini, frásæð tí, ið er tilskilað í pkt. 4.a.
6. Teknaður partapeningur er gjaldkomin í seinasta lagi vikudagin eftir, at tekningarfreistin er runnin, tó so, at teknaður partapeningur við nýtslu av fortekningarrætti, er gjaldkomin við tekning.
7. Partabrøvini eru til støddar DKK 100.
8. Tekning fer fram til kurs 550.
9. Við yvirtekning ger nevnd felagsins frítt av, hvussu tann til tekningar innboðna partapeningsupphædd - ið ikki er teknað við støði í fortekningarrætti – skal býtast millum tey, ið boðið hava sær til at tekna. Í hesum sambandi ger nevndin av, at við yvirtekning, skal tann til tekningar innboðna partapeningsupphædd - ið ikki er teknað við støði í fortekningsrætti – býtast við støði í hesi grundhugsan:
Høvuðsendamálið, ið verður lagt til grund við tilluting av partabrøvum, er at fáa ein nøktandi partaeigaraskara, við støði í almenninginum og við støði í instutionellum íleggjarum.
10. Freistin fyri verandi partaeigara til at gera nýtslu av fortekningarrætti sínum til at tekna partapeningin er frá fráboðan sambært § 34 stk. 2 í partafelagslógini um at tekningarlistar liggja frammi er lýst í almennum lýsingarblaði og 15 dagar fram, í seinasta lagi kl. 17.00 CET á tí seinasta tekningardegnum. Partabrøv felagsins eru skrásett á virðisbrævamarknaði og verður tí ásett, at sama tíðarfreist er galdandi fyri handli við hesum fortekningarrættindum. Fortekningarrættir fyri tey partabrøv felagsins, ið skrásett eru á ”Værdipapircentralen”, verða, vísandi til ásetingarnar í § 23 a, stk. 3 í partafelagslógini, at skráseta á ”Værdipapircentralen”. Fortekningarrættur fyri partabrøv skrásett í VP tilkemur tí sum seinasta børsdag undan freist fyri handli við fortekningarrættum kl. 12.30 CET í VP er skrásettur sum eigari av hesum.
11. Freistin fyri at tekna partapening annars er 15 dagar, at rokna frá fráboðan sambært § 34 stk. 2 í partafelagslógini um at tekningarlistar liggja frammi, er lýst í almennum lýsingarblaði. Tekningarfreistin endar kl. 17.00 CET seinasta dag í tekningartíðarskeiðnum.
12. Nýggju partabrøvini fáa rætt til vinningsbýtið, umframt onnur partaeigararættindi í felagnum, tá skráseting av kapitalhækking er farin fram í Skráseting Føroya at galda fyri alt viðkomandi roknskaparár.
13. Samlaði kostnaðurin, ið felagið skal rinda í sambandi við hækkingina í partapeninginum er, við støði í at mesta upphæddin verður teknað uttan fortekningarrætt, mett til í mesta lagi DKK. 9.000.000, og er í hesum íroknað gjald til Føroya Sparikassa P/F fyri at standa fyri og greiða arbeiðið við kapitalhækkingini, herundir ger av prospekti og skráseting av partabrøvum á VP, skrásetingargjøld, lýsingarkostnaður og advokatkostnaður fyri orðing av nevndarviðtøkum og skráseting í Skráseting Føroya av kapitalhækkingini v.m.
14. Tekning verður at fara fram á tekningslistar innihildnir í tí prospekti sett er upp í sambandi við hesa hækking í partapeninginum, ella á leysablaðtekningarlistar, ið liggja frammi á viðkomandi tekningarstøðum ella við nýtslu av teimum fortekningarrættindaskjølum útskrivaði verða frá VP smb. ásetingini í § 23 a stk. 3 í partafelagslógini.
15. Nýggi partapeningurin verður, eins og verandi, at útskriva frá Værdipapircentralen, umframt at hann verður at skráseta á íslendska virðisbrævamarknaðinum ICEX á sama hátt sum verandi partapeningur felagsins.
16. Tekningin kann - í seinasta lagi síðsta børsdag innan handil við fortekningnarrættum kann byrja - verða afturkallað, undir serligum óforútsæddum umstøðum, herundir force major og munandi broytingum í fíggjarligu umstøðunum hjá felagnum.

Verandi partaeigarar felagsins hava fortekningarrætt til tekning av tí partapeningi útboðin er til nýtekningar, hetta við rætti til at tekna nom. DKK 100 í nýggjum partapeningi fyri hvørjar nom. DKK 200 viðkomandi eigur av verandi partapeningi.

Fortekningarrættur kann verða nýttur í tíðarskeiðnum frá hósdegi tann 15. juni 2006 til og við hósdag tann 29. juni 2006 kl. 16.00 (føroyska tíð). Handlast kann við fortekningarrættum í sama tíðarskeiði.

Tekningartíðarskeiðið annars er frá hósdegi tann 15. juni 2006 til og við hósdag tann 29. juni 2006 kl. 16.00 (føroyska tíð).

**Nýtsla av fortekningarrætti:**

**Partabrøv skrásett á VP**
Partaeigari, ið hevur partabrøv útskrivaði frá VP, fær frá VP fráboðan um fortekningarrætt. Ynskir slíkur partaeigari at gera nýtslu av hesum fortekningarrætti, skal hann venda sær til kontoførandi peningastovn sín, og har greiða nýtsluna av fortekningarrættinum ímóti samstundis gjaldi fyri teknaðu partapeningaupphæddina.

**Partabrøv ikki skrásett á VP**
Partaeigarar, ið hava pappírspartabrøv og sum ynskja at nýta fortekningarrættin, skulu venda sær til Føroya Sparikassa P/F og har fáa greitt fortekningarrætt sín ímóti innlatan av pappírspartabrøvunum og annars gjaldi fyri partapeningsupphæddina.

Eru papírspartabrøv burturmist, verða hesi at mortificera og partabrøv, teknaði við støði í fortekningarrætti fyri burturmist partabrøv, afturhildin í depoti til mortificatiónstíðarskeiðið er runnið og mortificatión endaliga greidd.

Fær partaeigari við papírspartabrævi ikki fráboðan frá P/F Føroya Sparikassa sum tilskilað, verður hann at venda sær til P/F Føroya Sparikassa hesum viðvíðkjandi.

Aftaná at tekningarfreistin er úti (hósdagin 29. juni 2006 kl. CET 17.00) hava fortekningarrættirnir einki virdi.

**Tekning av partapeningi annnars**
Viðkomandi, ið annars ynskir at tekna partapening, skal í tíðarskeiðnum frá og við hósdegi tann 15. juni 2006 til og við hósdag tann 29. juni 2006 kl. 17.00 CET, venda sær til eitt av hesum tekningarstøðum:

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Føroya Sparikassi P/F** | **Norðoya Sparikassi** | **Suðuroyar Sparikassi** | **Kaupthing Føroyar** | **Spron Vedbref** | **Eik Bank** | **Føroya Banki** |
| Yviri við Strond 2 | Ósavegur 1 | 900 Vágur | Bókbindargøta 8 | Ármúla 13A | Nørre Farimagsgade 15 | Húsagøta 3 |
| 100 Tórshavn | 700 Klaksvík | Faroe Islands | 100 Tórshavn | 108 Reykjavík | 1364 København K | 100 Tórshavn |
| Faroe Islands | Faroe Islands | | Faroe Islands | Iceland | Danmark | Faroe Islands |

har tekningarlistar og prospekt liggja frammi at nýta í sambandi við tekningina.
Tekning fer fram til kurs 550 og merkir hetta, at fyri hvørjar kr. 100,00 teknaðar verða í partapeningi, skal rindast kr. 550,00.

**P/F Atlantic Petroleum**
**Nevndin"**

Atlantic Petroleum

Stephanssons Hús